SMS bladid
Trapputrøðin, Box 1059
100 Tórshavn
tel 358888
Útgevari: Sosialurin og Sølumiðstaðarfelagið, SMF
Blaðstjóri: Rógvi Róin
Lay-out: Sosialurin
Seting & umbróting: Sosialurin
Prent: P/F Prentmiðstøðin

# Fyrsta stigið

**Hendan oddagreinin stóð í fyrsta SMS blaðnum, sum kom út í sambandi við, at SMS lat upp dyrnar á fyrsta sinni, tann 2. november 1977.**

**»Nú hurðarnar verða latnar upp fyri 1. byggistigi av Sølumiðstaðarprojektinum, man tað neyvan vera nakar, sum ikki á ein ella annan hátt kennir til felagið SMS og tey flestu kanska við mistrúgv. Hetta er ein veruleiki, vit eru vitandi um, og sum vit skilja og góðtaka, men sum vit vóna at kunna bøta um**

**Sølumiðstaðarbygningurin er ein stórur bygningur, sum fær ein týðandi leiklut í býarmyndini. Hetta skapar serligan ans millum borgarar, sum fegnir vilja varðveita býarmyndina óspilta. Vit skilja væl óttan og kritikkin og ábreiðslurnar, sum herav standast. Men við tí ábyrgdarkenslu vit føla mótvegis borgarunum og myndugleikunum, taka vit ímóti kritikki og ábreiðslum sum stuðul at kunna fremja projektið soleiðis, at virðing fyri umhvørvi og trivna verður sett í hásæti.**

**Vit gerast nú forbrúkaratænarar, og tað er okkara ynski at kunna útinna hetta starv í sátt og semju við starvsfelagar okkara í býnum, við starvsfelagar okkara, sum vit hava størstu virðing fyri, og sum vit meta hava havt, hava og framvegis koma at hava ein avgerandi týdning til gagns fyri forbrúkaran.«**

**HM**



# Brævakassin

## Matur uttan gluten í Burger King

Eg vildi bert rósa Burger King við tí at teir selja Gluten-frítt. Men eg haldi, at tit áttu at skrivað tað í SMS-baðnum, av tí at tað eru nokk ikki nógv, ið vita av hesum.

Tey, ið mugu hava gluten-frían mat, hava ikki nógvar møguleikar at keypa slíkt í Føroyum, so eg haldi at tað skuldi verið lýst meir við tí. Tað er »super« gott, at onkur ger okkurt fyri hesi fólk, so haldi tit bert áfram við tí, tit á Burger King.

### Svar:

Tað er púra rætt, at Burger King hevur mat uttan gluten. Enn hava tey ikki gjørt nógv við at marknaðar hetta, men tað fara tey at gera. Síðan upplatingina 9. oktober hava tey fyrst og fremst roynt at venja starvsfólkini upp og veitt eina tænastu, sum Burger King um allan heimin er kent fyri at veita viðskiftafólki sínum.

RR

## Ruddar eingin av í matstovu tykkara?

Í sambandi við føðingardag tykkara leygardagin var eg saman við familju mínari í SMS. M. a. vóru vit eisini í nýggju matstovu tykkara, sum er innbjóðandi. Men eitt havi eg kortini at fílast á, tað er óruddið, sum stóð á borðunum; serliga í Burger King og Sunset. Har stóðu bakkar við matleivdum, tómum sodavatnsíløtum, pappíri o. ø. á nógvum borðum.

Tí fari eg at spyrja, um tit ikki hava nakran, sum ruddar av, ella er tað meiningin, at vit sum keypa, skulu rudda av fyri tykkum????

### Svar:

Leygardagurin var kanska ein serligur dag í so máta, at vit høvdu ógvuliga mong vitjandi í sambandi við føðingardagin, og tílíkar dagar kann tað tíverri gerast soleiðis, at starvsfólk okkara ikki røkka alt. Men tað er ikki meiningin, at tú og tín familja, skulu rudda upp eftir øðrum, sum hava sitið í matstovuni og etið. Eins og í útlondunum, er meiningin og okkara ynski, at hvør ruddar upp eftir sær sjálvum.

Í Burger King og Sunset nýta tey pappírpakning, sum vit ynskja, at viðskiftafólkini sjálvi rudda av borðinum og tøma í ruskíløtini, sum eru sett upp í matstovuni.

Í Perluni ynskja vit, at viðskiftafólk okkara seta bakkan við borðbúnaðinum á í stativini, sum eru til endamálið.

RR

## Er "Drive In" eisini "Walk In"

Eg setti bilin á Tinghúsvegnum 64 og fór til gongu oman í SMS.

Allar hurðar í SMS vóru afturlatnar og stongdar so eg slapp ikki inn í Hornið at keypa. Gekk so yvir til Burger King at keypa ein miðal chips. Aftan á at hava sagt mítt ynski 3 ferðir, fór eg til lúkuna at gjalda. Har segði eg skemtandi, at eg hevði ikki bilin við og fekk svar, at tað skuldi ganga hesaferð, men hetta var altso bert fyri bilar.

Mín spurningur er: Kann eitt fólk til gongu ikki keypa í »Drive In« hjá Burger King í SMS.

E.S. Annars smakkaði kipsið sera væl.

### Svar:

Søgan er eitt sindur skemtingarsom, og vit hava fingið sama fyrispurning frá øðrum viðskiftafólkum. Í stuttum kann sigast, at týdningurin av orðinum »Drive In« er – og tað vita flest øll – at tú koyrir inn. Tí havi eg fingið at vita frá teimum í Burger King, at teirra »Drive In« bert er fyri koyrandi viðskiftafólk, t. v. s. at eitt fólk til gongu ikki kunnu keypa í »Drive In« hjá Burger King í SMS ella nakra aðrastaðni í heiminum.

RR

# Nú er tíð at søkja um tiltøk á Torginum

## Hvør sleppur at skipa fyri inntøkufremjandi tiltøkum á Torginum í 2003?

Torgið í SMS hevur verið gott mið hjá mongum í mong ár. Og tað verður tað helst framvegis.

Eins og í ár, kunnu áhuga- og ítróttarfelaøg, skúlaflokkur og onnur nú søkja um loyvi at hava inntøkufremjandi tiltøk á Torginum í SMS í 2003.

Greiðið frá, hvat innkomni peningurin skal nýtast til, hvat inntøkufremjandi tiltak, tit ætla at skipa, og hvat spennandi tiltak og ella framsýning – sum fær enn fleiri vitjandi inn í SMS – tit hava ætlanir um at hava.

Nýtið hugflogið og verið skapandi. Tey bestu og mest spennandi hugskotini verða vald út.



*Nøffelina og Hannibal á Torginum í SMS*

Eru ivamál, ber til at ringja á tel. 35 88 80.

Møguligar umsóknir skulu sendast til SMF, Postboks 1059, 110 Tòrshavn, viðmerk brævbjálvan: »Leiga Torgið«

Seinasta freist at lata inn umsókn er fríggjadagin 13. desembur 2002.

Umsóknarblað og upplýsingar eru eisini á www.sms.fo.






TILBOÐ - TILBOÐ - TILBOÐ

Sætre keks, Kornmo, Kaptajn ella frokost
3 pk. 25,00

Rynkeby juice appelsin ella súrepli
3x1 ltr. 25,00

Omo vaskipulvur
1,8 kg. 25,00

Bonbon max mix
1 pk. 10,00

Faxe Kondi
1,5 ltr. 10,00 ant

Klementinur
1 bk. 10,00

Brúnar køkur
450 gr. 12,95

Galle & Jessen breyðsjokoláta 90 stk.
1 pk. 29,95

Piparnøtur
500 gr. 10,95

Merrild kaffi
500 gr. 15,95

Knorr karry suppa
1 pk. 13,95

MIKLAGARÐUR